# Nógvir eykatúrar um eru mestsum uttan fólk

Fleiri av eyka túrunum, sum Ternan og Teistin sigla um Skopunarfjørð, eru nærum tómir, vísa hagtøl hjá Strandferðsluni, segði útvarpið hjá Kringvarpinum í morgun. Tað eru sjáldan fleiri enn 30 fólk við Ternuni, sum saman við Teistanum sigla 33 eyka túrar aftur og fram hvørja viku um Skopunarfjørð. Serliga slakir eru túrarnir millum klokkan 8 og 11 fyrrapartin og tíðliga seinnapartin, tá sera fá fólk eru við. Eyka túrarnir komu, eftir at tvær milliónir vórðu játtaðar á fíggjarlógina til eykasiglingina um Skopunarfjørð. Hvør túrur hjá Teistanum ella Ternuni kostar okkurt um 8.600 krónur.





# Á ævintýraferð

**Mikukvøldið fekk Sosialurin vitjan av Búa sibbidibbidimdimdubadabaDam og Dánjali Kagga Ding Ding Kagga Ding Ding Kagga Dum. Vit fingu eitt lítið innlit í í ævintýraferðina, ið hesir báðir hava sýnt fram fyri børnum á ólavsøku fimm tey seinastu árini**

SJÓNLEIKUR
*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Klokkan er nær um tíggju mikukvøldið, og Miðlahúsið er ikki akkurát tað staðið, eg havi bestan hug at fara seint á kvøldi. Eg skal gera eina samrøðu við teir báðar, Búa Dam og Dánjal á Neystabø, handan ævintýraferðina, ið hevur verið sýnt fyri børnum á ólavsøku seinastu fimm árini.

Hóast eg var troytt og ikki hevði stórvegis hug at arbeiða, gjørdist eg skjótt hugtikið barn aftur, tá »Dánjal Kagga Ding Ding Kagga Ding Ding Kagga Dum« setir seg við klaverið og spyr:

– Hvat skal sangurin snúgva seg um?

Eg seti meg á stólin frammanfyri hann, taki beinini upp til mín og eygleiði spent, júst sum eg havi gjørt so ofta áður, tá áhugaverdar barnasendingar og sjónleikir hava verið fyri mínum eygum.

– Sangurin skal snúgva seg um at vera forelskaður, sigi eg og gleði meg at hoyra klaverið spæla. »Búi sibbidibbidimdimdubadabaDam« setir seg undir liðini á Dánjali.

– Hvør er forelskaður? Spyr Búi.

– Tú er, sigi eg til stuttleika og peiki á Dánjal.

Vit sita øll trý og kjakast um, hvat »tú« rýmar á, og vit finna skjótt út av at seta eitt vers saman. Dánjal Kagga Ding Ding Kagga Ding Ding Kagga Dum fær futt í klaverið og fer at syngja av øllum alvi.

– Eg eri so forelskaður, syngur Dánjal, og eg eri heilt vís í, at tað er hann. Búi tekur meg aftur upp í leikin, tá vit syngjandi svara honum aftur:

– Jú, tað ert tú nú, jú, tað ert tú beint nú.

Men vit eru als ikki liðug at syngja enn. Eg skal eisini siga teimum, hvørjum Dánjal hevur hug at. Eg sigi síðan, at tað er ein genta, ið eitur Lena. Dánjal er forelskaður í Lenu.

– Jamen, hvussu sær Lena út? Spyr Búi dibbidibbidimdimdubadabaDam. Eg gerist enn meira hugtikin, og hugflogið fer sanniliga á flog. Lena verður síðan ein lítil genta við flættum.

– Jamen, hvat rýmar á flættur? Hugflogið fær fríar ræsur, og nógv ymisk orð koma í geyma. Hattur, skattur, lættur o.s.v. Eitt vers kemur síðana aftur at, tá Dánjal og Búi aftur fara at lata ljóðið streyma úr munninum.

– Fitta Lena hevur flættur, hon er ein skattur, hon dansar sum ein hattur, mín hugur gerst lættur, og teir báðir geyla og skrála, og eg haldi hetta als ikki vera keðiligt.

– Nú halda tit uppat, rópar eitt og nýsur burtur úr ongum. Vit hyggja øll upp á hvønn annan og runt Miðlahúsinum, tá Babu Babu Ubab illur gongur yvir til okkum.

– Tit kunnu ikki avdúka allan sjónleikin, geylar Babu Babu Ubab og nýsur.

– Babu Babu Ubab nýsur, tá hann er illur, teskar Búi til mín, so illi ikki hoyrir tað.

– Vit avdúka bara eitt sindur, sigur Dánjal biddandi. Men her er einki at gera, Babu Babu Ubab sigur nei. Eg sleppi ikki at síggja meira.

– Brúka pippið, sigur Búi, og vit renna øll upp gjøgnum stóru trappurnar og síðan einar lítlar trappur upp í studio hjá Rás2. Har far Babu Babu Ubab ikki komið. Niðri undir stendur eitt og rópar, geylar og nýsur, men tað ger ikki pettið, tí at nú skal eg síggja eitt petti úr sjónleikinum hjá Búa og Dánjal. Vit skulu brúka pippið, sigur Búi og stillar seg soleiðis, ið hann eigur at standa í sjónleikinum. Hann hyggir upp í loft og spyr viðleikaran, um hann ikki sær tað, ið er uppi í luftini?

– nei, eg síggi einki, sigur Dánjal, sært tú nakað? Spyr hann meg.

– nei, eg síggi einki, sigi eg, tí eg síggi veruliga einki.

– Tað er tí, at tit ikki brúka pippið, sigur ein irriteraður Búi, síggja tit ikki grísin uppi í luftini? Dánjal heldur hetta vera totalt surrealistiskt og sigur, at tað ger hann avgjørt ikki, og tað geri eg heldur ikki. Búi tekur í Dánjal og stillar hann har, Búi stóð frammanundan.

– Hvussu hevði grísurin sæð út, um hann nú var har? Spyr Búi.

– Jú, hann hevði verið grønur og spikafeitur, sigur Dánjal og skilur ikki ordiliga, hvat tað er, hann ger.

– Og hvussu við oyrunum og halanum, hvussu høvdu hesu sæð út?

– Jú, oyrini eru lang og hanga heilt niðri á jørðini, og halin er ordiliga stuttur, sigur Dánjal og verður knappliga sera hugtikin av hesum grísinum. Eg ivist ikki í, at hann veruliga sær hendan grísin uppi í luftini, ið hann stendur og eygleiðir.

– Nú mugu tit steðga, geylar Babu Babu Ubab. Hann er sloppin upp gjøgnum trappurnar inn í studio hjá Rás2, hóast vit ikki hildu, at hann kundi.

- Tit mugu ikki siga børnunum longu nú, hvat fer at henda á hesari ævintýraferðini, sigur hesin illi og nýsur sum ongantíð áður.

– Børnini skulu sjálvi vera við í hesari ferðini á ólavsøku, so tit noyðast at bíða til á ólavsøku, sigur Babu Babu Ubab. Dánjal og Búi ganga kúgaðir oman trappurnar og út úr Miðlahúsinum við Babu Babu Ubab í hølunum. Hóast eg ikki hevði so góðan hug at arbeiða í kvøld, eri eg eitt sindur vónsvikin, at eg ikki slapp at síggja meir. Eg noyðist bara at brúka pippið júst sum Búi og Dánjal og bíða til ólavsøkuna saman við øllum hinum spentu børnunum, ið gleða seg at fara á ævintýraferð.